DAGFØR
TEG
sosialurin
HALT
SOSIALIN

Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

sosialurin

# Danska liðið úttikið

*Danski landsliðsvenjarin, Morten Olsen, hevur gjørt av, hvørjir teir 18 leikararnir verða, sum skulu við til Føroya*

JÁKUP MØRK

Tríggir spildurnýggir landsliðsleikarar eru við í ferðalagnum, tá danska landsliðið eftir vikuskftið setir kós móti Føroyum. Landsliðsvenjarin, Morten Olsen, og hjálparvenjari hansara, Michael Laudrup, høvdu sum væntað broytt eitt sindur upp á samansetingina av fólkinum, sæð í mun til EM-endaspælið.

Nakrar av broytingunum vórðu rætt og slætt tvungnar, tí viðkomandi leikarar ikki longur eru tøkir til landsliðið, ella hava givið avboð, orsakað av skaða. Millum hesar seinast nevndu eru so navnframir leikarar sum Michael Jørgensen og Michael Laursen, sum dagliga royna seg í bestu italsku deildini.



*Miðskeiðis í áttatiárunum var Michael Laudrup ein av eksponentunum fyri áskoðaravinarliga spælinum, sum donsku dynamittdreingirnir sýndu. Millum annað í minniliga 4-2 sigirnum á russisku bjørnini*

### Í tráð við fortíðina

Var tað væntað, at hesir spælarar vórðu sáldaðir frá, so kann tað sama ikki sigast um onkrar aðrar av teimum, sum ikki hava fingið landsliðsboð hesu ferð. Sostatt eru hvørki Stig Tøfting ella Michael Schønberg við í hópinum til Føroya, og einki er at taka seg aftur í, at hetta fyri teirra viðkomandi er eitt vónbrot. Landsliðsvenjarin hevur tó boðað frá, at hesir leikarar langt ífrá skulu gloymast. Á tíðindafundi boðaði hann frá, at hann var fullgreiður um, hvat hesir leikarar høvdu at bjóða, men at hann heldur vildi nýta dystin móti Føroyum til at síggja, hvørt onnur landsliðsevni veruliga kunnu standa seg á hesum støði.

Hjá teimum, sum undanfarin ár hava funnist at danska landsliðnum, tí hesir hava spælt ov keðiligan fótbólt, er helst gleðiligt at staðfesta, at ein nýggjur reyður tráður er at hóma í landsliðsúttøkuni. Øðrvísi kann tað valla tulkast, tá teir tríggir nýggju leikararnir, Michael Johansen, Dennis Rommedal og Henrik Tømrer Pedersen, allir eru leikarar, sum fyrst og fremst hava gjørt vart seg í framrættaða spælinum. Nakað sum serliga Michael Laudrup var borganin fyri, tá hann spældi á landsliðnum, har hann so við og við gjørdist náttúrligi avloysarin hjá føroyska landsliðsvenjaranum, Allan Simonsen.

Til stuttleikar kann nevnast, at teir báðir hava eina fortíð í Barcelona, og enntá kundu gjørst liðfelagar í katalanska stórfelagnum. Ta ferðina var Michael Laudrup tó bert 17 ára gamal, og tá tað kom til stykkis, vóru hvørki hugur ella dirvi nóg stórt til at rýma heiman ífrá fyri at gerast yrkisleikari í einum av heimsins størstu feløgum. Barcelona, sum annars var fyrsta europeiska stórfelagið, ið sýndi áhuga fyri Laudrup, fekk tó sín vilja nøkur ár seinni, og varð Laudrup tá ein tann største stjørnan á sonevnda

### Liðið

Teir átjan leikararnir, sum verða við á Føroyaferðini eru:
Peter Schmeichel (Sportin Lissabon), Thomas Sørensen (Sunderland), Jan Heintze (PSV Eindhoven), René Henriksen (Panathinaikos), Thomas Gravesen (Everton), Claus Thomsen (Wolfsburg), Thomas Helveg (Milan), Per Frandsen (Bolton), Bjarne Goldbæk (Fulham), Allan Nielsen (Watford), Brian Steen Nielsen (AB), Claus Jensen (Charlton), Michael Johansen (AB), Morten Bisgaard (Udinese), Dennis Rommedahl (PSV Eindhoven), Jon Dahl Tomasson (Feyenoord), Henrik Pedersen (Silkeborg), Ebbe Sand (Schalke 04)

### Stórur áhugi

Sum kunnugt, so er hetta fyrsti dysturin, at teir báðir nýggju venjararnir standa við stýrisvølin, og donsku fjølmiðlarnir gera nógv burturúr.

Í sjálvum sær er tað jú áhugavert, at nýggjur venjari tekur við, men tá talan so samstundis er um tvær tjóðarhetjur, sum vóru millum høvuðsmenninar aftan fyri donsku landsliðsframgongdina, ja so ber av.

Hesu ferð er tað tó ikki á vøllinum, at teir sleppa at geva sítt íkast til liðið, men hinvegin er danska vónin, at teir kunnu eggja leikarunum at spæla sama slag av fótbólti, sum dynamittliðið í áttatiárunum. Um hetta verður veruleiki, fæst so fyrsta ábendingin um komandi mikudag.

# Piltabóltur í Klaksvík

*Eins og vanligt skipar KÍ aftur í ár fyri sonevndu John Reid kappingini, ið er fyri piltar*

JÁKUP MØRK

Í tíðindaskrivi hevur KÍ boðað frá, at árliga John Reid kappingin verður hildin in leygardagin 12. august.

Talið á luttakandi liðunum eru í ár 7, og eru koma hesi frá 6 ymsum feløgum. Talan er um lið úr HB, sum hevur 2 lið, EB/Streym, NSÍ, B36, KÍ og ÍF.

Áðrenn komið verður til avgerandi dystirnar, verða liðini fyrst býtt í tveir bólkar. Í bólki 1 eru HBa, EB/Streymur, NSÍ og B36 a. Trý lið eru í bólki 2, nevnliga HBb, KÍa og ÍF.

### Læettari hjá teimum smærru

Kappingin er sett at byrja kl. 12.00, tá farið verður undir bólkaspælið. Av tí at spælt verður um hálvan vøll, kunnu báðir bólkarnir avgreiðast í senn, soleiðis at kappingin kann vera liðug lonug kl. 17.00.

At kappast verður um hálvan vøll, merkir eisini, at tað er lættari hjá smærru feløgunum at gera seg galdandi. Ofta er tað nevnliga soleiðis hjá hesum feløgum, at tey hava fleiri frálíkar leikarar, men kortini ikki nóg nógvar til at hava eitt veruliga sterkt lið, tá spælast skal um heilan vøll.

Tá spælt verður, sum tað eitt verður í John Reid kappingini, krevjast bert 7 mans á hvørjum liði, og er tað munandi lættari at seta lið saman. Hóast tað bert kunnu vera 7 mans á vøllinum í senn, kann hvørt lið mynstra við 13 leikarunum, so hóast alt er eisini rúmd fyri tiemum feløgum, sum hava ein hampuliga stóran leikarahóp.

Eftir kappingina verða heiðursmerki latin trimum teimum fremstu, umframt at ferðasteyp verður latið vinnandi liðnum.

Eisini er møguleiki hjá leikarunum at fáa sær ein bita í KÍ høllini.



# Daewoo Marathon Cup

*Leygardagin verður farið undir fyrsta umfar av nýggju kappingini, har luttakararnir til samans renna heilt marathon*

Nú Grand Prix kappingin í renning, sum Deildarsambandið fyri Súkkling og Frælsan Ítrótt skipar fyri, er farin aftur um bak, verður farið undir eina nýggja kapping, sum verður roynd fyri fyrstu ferð í Føroyum. Henda nýggja kappingin eitur Daewoo Marathon Cup og er samansett av fýra rennikappingum í tilsamans verða 42.195 metrar ella tað sama sum eitt heilt marathon (harav navnið).

**Skráin fyri Daewoo Marathon kappingina**

| Umfar | Dagur | Teinur | Staður | Kapping |
|---|---|---|---|---|
| 1. | 12. aug. | 5 km | Klaksvík | Daewoo Renning |
| 2. | 19. aug. | 1/2-marathon (21,1 km) | Tórshavn | FM |
| 3. | 16. sept. | 10,5 km | Toftir | Runt Agnið |
| 4. | 21. okt. | 5,6 km | Kambsdalur | Daewoo Renning |

### fýra umfør

Vinnari av kappingini verður so tann rennarin, sum samanlagt hevur brúkt minst tíð til at gjøgnumføra tann samlaða teinin uppá 42.195 metrar. Kappingin verður skipa fyri bæði kvinnur og menn. Vinnarin fær kr. 500, meðan nr. 2, 3, 4 og 5 fáa ávikavist kr. 400, 300, 200 og 100. Eisini verða steyp latin til nr. 1, 2 og 3.

Treytin fyri at kunna vera við, tá endaliga støðan verður uppgjørd, er at viðkomandi rennari hevur luttikið, og er komin á mál, í øllum fýra umførunum, sum telja við í kappingini. Umførini framganga av yvirliti aðrastaðni á síðuni.

*Fyrireikingarnir vóna, at nógvir luttakarar verða við, tá fyrsta umfar av kappingini fer av barkastokki leygardagin*



### Byrja leygardagin

Longu komandi leygardag, 12. august, verður fyrsta umfar av kappingini, tá ítróttafelagið, Treysti, skipar fyri 1. umfari.

Runnið verður tá úti á Bumshamri í Klaksvík,, og gongur teinurin eftir Stoksoyravegi, undir Klakki, Bumshamarvegur og Kelduskákið - íalt fýra umfør. Byrjan og mál verða heilt úti á endanum á Stoksoyravegi og tilmelding fer fram á verkstaðnum hjá høvuðsstuðlinum, P/F Esmar Simonsen á Bumshamri frá kl. 11.30.

### Eisini renning fyri børn

Í sambandi við renningina í Klaksvík um vikuskiftið, verður eisini skipa fyri renning fyri børn. Henda renning er í trimum aldursbólkum fyri bæði gentur og dreingir. Aldursbólkarnir verða hesir:

børn undir skúlaaldur, børn 1.-3. flokkur og børn 4.-6. flokkur. Børnini renna eftir Torvgøtu, Kelduskákið og Stoksoyravegi. Teir yngru aldursbólkarnir renna eitt umfar tvs. 870 metrar, meðan tey størru børnini renna tvey umfør tvs. 1760 metrar. Vegvísari hjá børnunum verður aftur í ár Karl Birgir Isaksen og fer hann eisini at handa heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3 hjá bæði gentum og dreingjum í øllum aldursbólkum. Luttøkugjaldi er kr. 20 fyri bæði børn og vaksin, tó er gjaldi fyri systkin kr. 10 í part. Skráin fyri rennikappingina sæst aðrastaðni á síðuni

### Góðar vónir

Fyrireikarnir úr Treystinum leggja stóran dent á at renningin er fyri øll, og vóna teir at luttøkan verður eins góð sum hon plagar at verða tá rennikapping er í Klaksvík.

**Skráin fyri renningina í Klaksvík um vikuskiftið**

| Klokkan | | Umfør | Teinur |
|---|---|---|---|
| 11.30 | Tilmelding byrjar | | |
| 12.00 | Børn undir skúlaaldur | 1 | 870 m |
| 12.10 | Børn 1.-3. flokk | 1 | 870 m |
| 12.20 | Børn 4.-6. flokk | 2 | 1.760 m |
| 12.30 | Vaksin | 4 | 5 km |
| 13.00 | Heiðursmerkjahandan | | |

# Met á 800 m

*Tordis Eiriksfoss setti nýtt met á 800 m teininum, tá FM í frælsum ítrótti varð fyriskipað á Svangaskarði um vikuskiftið*

JÁKUP MØRK

Gamla metið á teinum, sum Tordis eisini átti, var heili 11 ára gamalt. Hetta varð sett, tá hon á oyggjaleikunum í 1989 rann teinin upp á 2.31,90. Hesu ferð var tíðin 2.26,4, so talan var um eina stóra betran.

Umframt metið hjá Tordis, megnaði Ási Mikkelsen at javnseta føroyska metið á 100 m teininum, meðan Rigmor N. Joensen setti persónligt met á 500 m.

Úrslitini av ymsu kappingunum vórðu annars hesi:

100 m, menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Ási Mikkelsen | Sandur | 11,3 |
| 2 | Regin Arge | Bragdið | 12,2 |
| 3 | Bogi Lenvig | Bragdið | 13,1 |
| 4 | Johann Rubek Nielsen | Tórshavn | 13,2 |
| 5 | Rógvi Højgaard | Tórshavn | 13,7 |

100 m, dreingir

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Øssur D. Eiriksfoss | Bragdið | 16,8 |
| 2 | Ólavur Jacobsen | Treysti | 17,5 |
| 3 | Teitur Nielsen | Tórshavn | 18,6 |
| 4 | Ólavur D. Eiriksfoss | Bragdið | 19,0 |
| 5 | Jan Elmar Sørensen | Treysti | 21,1 |
| 6 | Jón Bjarnastein | 24 | |

800 m, kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Tordis D. Eiriksfoss | 2.26,4 | |

800 m, menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Evald við Garð | Kollafjørður | 2.11,4 |
| 2 | Bogi Lenvig | Bragdið | 2.17,3 |
| 3 | Johan Rubek Nielsen | Bragdið | 2.21,0 |
| 4 | Sigurð Justinussen | Bragdið | 2.25,4 |
| 5 | Sam Vang | Oyrabakki | 2.56,8 |

5000 m, kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Sunnuvá Bjarnastein | Bragdið | 19.17,1 |
| 2 | Rigmor N. Joensen | Bragdið | 19.19,7 |
| 3 | Borgarhjørt Holm | Bragdið | 20.43,2 |
| 4 | Ann Thomsen | Bragdið | 23.01,0 |

500 m, menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Guttorm Sørensen | Treysti | 16.13,5 |
| 2 | Signar Røsvik | Bragdið | 16.19,9 |
| 3 | Sølvi R. Hansen | Roysnið | 17.45,8 |
| 4 | Niels Jákup Jacobsen | Bragdið | 18.09,2 |
| 5 | Sam Vang | Oyrabakki | 18.23,4 |
| 6 | Sigurð Justinussen | Bragdið | 18.30,9 |
| 7 | Olaf Olsen | Roysnið | 19.07,1 |
| 8 | Óli Olsen | Bragdið | 19.20,5 |
| 9 | Súni Jacobsen | 19.41,8 | |
| 10 | Robert Vilhelmsen | 20.24,3 | |



# Kappríðing

Hóast nakað er fráliðið, so verða úrslitini frá kappríðingini á ólavsøku prentað niðanfyri.

**Trav**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Stígandi | Herdi Dahl | 60,4 |

**Tvíspor, ung**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Maskott | Øssur Andreasen | 35,8 |
| 2 | Svanna | Djóni Poulsen | 36,5 |
| 3 | Litbrá | Barbara Carlsen | 36,5 |

**Tvíspor, 2. flokkur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Linsa | Siri Davidsen | 35,9 |
| 2 | Garpur | Jákup W. Joensen | 36,6 |
| 3 | Tindur | Jóannes Poulsen | 36,7 |

**Tvíspor, 1. flokkur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Lokkur | Kristfríð Jacobsen | 33,3 |
| 2 | Súsi | Zacharias Jacobsen | 33,3 |
| 3 | Fenja | Hallur Hansen | 34,1 |